# Terji á pall í Hvalba



*Hetta er nakað av tí besta, vit hava hoyrt frá Terja í fleiri ár, skrivaði Sosialurin eftir Prix Føroyar umfarið í Fuglafirði fyrr í mánaðinum. Hann helt at teir spældu hamrandi væl og tað var ikki minst takka verið framúrskarandi rútmunum hjá Rógva á Rógvu og Arnhold Ludvig*

**Í kvøld fara Terji Rasmussen og hansara orkestur á pall í Hvalba fyri fyrstu ferð í langa tíð**

TÓNLEIKUR

*Áki Bertholdsen, aki@sosialurin.fo*

Í kvøld, leygarkvøldið, verður forvitnisligt tónleikatiltak í Hvalba. Tí tá fer gamli Prix Føroyar vinnarin, Terji Rasmussen á pall í Roynhøllini í Hvalba.

Terji Rasmussen Band liggur eisini væl fyri í Prix Føroyum í ár.

Terji Rasmussen band var favorittur at vinna innleiðandi umfarið í Prix Føroyum í Fuglafirði fyrr í mánaðinum og tað stóð heldur ikki á at koma víðari.

Fyri fyrstu ferð síðani, eru teir nú í suðuri og spæla - kanska sum eitt slag av upphiting til Prix Føroyar hálvfinaluna á Tvøroyri fyrst í næsta mánaði.

Tað er nú næstan eitt heilt ár síðani at teir vóru í Hvalba seinast, so hetta verður eitt kærkomið høvið til uppliva ein av okkara royndastu og mest markantu tónleikarum seinastu nógvu árini.

Terji Rasmussen er ein av okkara allarkendastu tónleikarum og sangarum og ikki minst eru hansara framførslur í serflokki og hann er ein av okkara allarbestu framførarum.

Og tað er onki at ivast í, at suðuroyingar hava nakað at gleða seg til.

Eftir Prix Føroyar umfarið í Fuglafirði, skrivaði ummælarin hjá Sosialinum, at Terji var enn í Prix-formi og hann helt, at tað var rættvíst, at Terji Rasmussen Band slapp víðari í kappingini.

– Stílurin minti um Moirae-dagarnar, men saman við framúrskarandi rútmunum hjá Rógva á Rógvu og Arnhold Ludvig bleiv tað meir funky, segði ummælarin hjá Sosialinum, sum eisini helt, at hetta var nakað av tí besta, vit hava hoyrt frá Terja í fleiri ár.

– Tað var ikki nakað beinleiðis nýtt, men hinvegin so var tað so hamrandi væl leikt og framførslan hjá Terja var so mikið góð, at fá mundu ivast í, at hann kom víðari í kappingini.

Í sambandi við dansin í Roynhøllini í kvøld, verður ferðasambandið kring oynna gott, tí MP-Bussar fara at koyra av Tvøroyri og Poul Johannus Poulsen koyrur úr Vági.

# Sendarin hjá landsstýrismálanevndini

**Málið um millumbylgjusendaran fyllir nógv hjá føroyingum. So nógv, at málið er latið landsstýrismálanevndini at viðgera**

SENDARIN

Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður, vil hava landsstýrismálanevndina at viðgera málið um slóknaða millumbylgjusendaran. Løgtingsmaðurin vil staðfesta eina ábyrgd av støðuni.

Løgtingsmaurin heldur, at málið er meira gruggað enn greitt, og hann vil nú hava landsstýrismálanevndina at staðfesta eina ábyrgd fyri hesi ólikindi og plasera hana á røttum stað, sum hann málber seg í brævinum til landsstýrismálanevndina.

Uttan at hann sigur tað beinleiðis, kann brævið frá løgtingsmanninum tulkast soleiðis, at hann hevur hug at halla til at tað er landsstýrismaðurin við vinnumálum heldur enn Føroya Tele, sum hevur ábyrgdina av støðuni, sum er íkomin.

Og við Dag og Viku hóskvøldið segði hann, at kann tað staðfestast, at landsstýrismaðurn hevur ábyrgdina, eigur hann at leggja frá sær.

Tórbjørn Jacobsen er ikki nøgdur við, at landsstýrismaðurin ger eina kanning »av sær sjálvum«, sum hann tekur til og so fer at lata løgmanni eina frágreiðing um hesa kanning.

*ej*

## Kristiliga fótbóltskappingin longu fullteknað

**Eiði:** Tað gekk helst skjótari enn væntað at koma á mál við teirri kristiligu fótbóltskappingini, ið ætlanin er at hava í ítróttarhøllini á Eiði 2. apríl.

Teir boðaðu frá kappingini í bløðunum, og tað vísti seg rættiliga skjótt, at hetta hevði áhuga millum tey ungu. Tað gekk nevniliga ikki long tíð inntil kappingin var fullteknað.

Kappingin verður skipað sum aðrar kappingar við eini dreingjakapping og eini gentukapping, har trý tey fremstu liðini fáa heiðursmerki.

Umframt fótbóltskappingina verður eisini nógv annað á skránni. Har verða eisini borðtenniskapping og tað teir nevna Fussball-kapping, umframt andakt og áhugatímar.

Sagt verður, at tað kostar hvørki at koma inn í høllina at hyggja ella at fara til áhugatímarnar.

*sb.*

## Teknikapping fyri børn

**Havn:** Í samband við at H. C. Andersen fyllir 200 ár í ár verður skipað fyri eini teknikapping á barnabókasavninum fyri børn upp til 13 ár.

Bestu uppskotini verða prentað sum bókamerkir, og teknararnir vinna eina bókavirðisløn á 500 kr. Myndaevnið skal vera úr onkrum H. C. Andersen-ævintýri.

Teknitilfar og pappír hava ligið frammi á barnabókasavninum frá seinasta mánadegi, og verða tey liggjandi frammi til leygardagin 2. apríl, sum jú er føðingardagur H. C. Andersens.

Sagt verður, at tað ber til hjá børnunum at sita inni á bókasavninum og tekna, ella tey kunnu taka pappír heim við at tekna á.

*sb.*

## Tónleikur, frásøgn og yrkingar

**Klaksvík:** Fríggjakvøldið 1. apríl kl. 21 verður ein heldur forvitnislig konsert í Atlantis. Tá fara bæði klaksvíkingar og gestir aðrastaðni frá fara at luttaka. Tey luttakandi eru Páll Sólstein, Karl Martin Samuelsen og Aldubáran.

Páll Sólstein hevur sítt dagliga virki sum tónleikari í Kongaliga Kapellinum í Keypmannahavn. Hann spælir horn í hesum úrmælingaorksetri, ið telist millum allarbestu í Norðanlondum. Vit kenna hann sum lim í Føroya Symfoniorkestri og Tónleikabólkinum Aldubáruni.

Páll hevur seinni árini gjørt løg til yrkingar hjá m.a. Christian Matras og William Heinesen. Afturat sær hevur hann fingið limir í Aldubáruni at leika undir, og fer Karl Martin Samuelsen at leggja rødd til.

Tað er Páll ið hevur lagt tónleikin til rættis, og luttakarnir vera hesir: Karl Martin Samuelsen og Anna Maria Olsen, sangur; Andrea Heindriksdóttir, floyta; Jógvan Zachariassen, fagot; Sámal Petersen, violin; Andras Olsen, trombon; Ólavur Olsen, trompet; Ólavur Jacobsen, guitar; Arnhold Ludvig bass og Stamen Stantchev, keyboard.

Umframt tónleikin, verður eisini frásøgn um yrkingarnar, og hetta fer Andras Sólstein at taka sær av.

## Hálvt kilo av hasji

Fríggjamorguin var tollvaldið í Havn umborð á grønlendska bátinum, Polar Natoralik. Hesin var komin at havn at taka útgerð, áðrenn farið varð víðari til Grønlands.

Men nú er ikki víst, at allir mans sleppa við heim til Nuuk. Umborð fann tollvaldið nevnliga hálvt kilo av hassji, og tann fongurin er nú latin løgregluni, sum ger av, hvat víðari skal henda í málinum.

*-jm*